# 60 ár síðan kríggið

## 60 ár síðan stovnanina av ísraelska statinum – Fyri tað eina fólkið var tað frelsa frá náðileysum óndskapi í Evropa, meðan fyri hitt fólkið ein ólukka



**Miðeystur**



**Johan Jacobsen**
johan@sosialurin.fo

Í farnu viku var 60 ár síðan staturin Ísrael var settur á stovn. Og fleiri sendingar eru settar á skrá í sjónvarps- og útvarpsrásum í okkara parti av heiminum. Ísrael eigur eitt serligt stað í hjartanum hjá mongum føroyinginum. Fleiri hava í sínum ungu árum verið á Kibbutz. Bæði føroysk streingja- og barnakór syngja sangir á hebraiiskum. Og fleiri, fleiri føroysk ferðalið hava eftir hondini vitja í Heilaga Landinum.

Men, meðan hátíðarhaldið av at tað er 60 ár síðan staturin Ísrael var stovnaður, fer fram, so markera palestinar eisini dagin. Fyri teimum kallast hendingarnar kring hendan dagin »al-Nakba«, sum merkir »vanlukkan«.

### »al-Nakba« - vanlukkan

Síðst í 19. øld, tá ið jødar í Evropa fyri fyrstu ferð fluttu til Palestina í størri tali, var økið uppdeilt í smærri eindir, at líkna við kommunur, sum so vóru stýrdar úr Konstantinopel, Beirut og Damaskus. Í økinum í 1880unum búðu umleið 450.000 palestinskar arabarar og 25.000 jødar, harav teir allarflestu ultra-ortodoksir og ikki tjóðskaparsinnaðir við búðstaði í býnum Jerusalem, Hebron, Safed og Tiberias.

Síðst í 19. og fyrst í 20. øld var samleikin hjá palestinskum arabarum ikki sum eitt fólk, sum fyrst og fremst var palestinskt, men heldur sóu teir seg sum sáttar av Osmanska Ríkinum og samstundis sum limir í einum stórum islamskum samfelag. Sostatt hevði ein palestinsk statseind sum so ongantíð virkað, valdið var sum heild útynt út frá øðrum stórbýum. Samleikin hjá palestinsku arabarunum var, í tí lokala, knýttur at teirra býum og bygdum, klanum og familju – ikki at palestinska fólkinum, hetta kom tó seinni. Rættiliga valdssætið hevði gjøgnum tíðirnar antin verið í Damaskus, Beirut, Kairo ella Konstantinopel.

Hinvegin vóru jødisku niðursetarar við eitt partar av einum lítlum jødiskum samfelagi og afturat vóru teir flestu dugnaligir bøndur. Afturat hesum vóru osmansku myndugleikarnir ikki seinir við at selja byggiloyvir og jørð til tilflytarar við pengum. Flestu jødar fóru av evropeiska meginlandinum antin til USA ella til Stórabretlands, men at byrja við fóru einstakir til Palestina. Seinni vaks hendan tilflytingin – sí faktaboks.

Sum innflytingin av jødum tók dyk á seg, so tilsvarandi vaks mótstøðan ímóti hesi gongd. Serliga í tíðini eftir 1. Veraldarbardaga, tá ið bretar tóku við valdinum í økinum. Í árunum 1936-39 var arabiskur uppreistur ímóti Yishuw, sum var navnið á jødiska samfelagnum tá.

Mótmælisgongur vóru hildnar og ófriðurin vaks. Í hesi tíðini harnaði hetta nýggja stríðið millum palestinskar arabarar og jødar, og smærri vápnaðir yvirgangsbólkar vóru skipaðir á báðum síðum og fingu vaksandi stuðul frá fólki. Herímillum var Haganah ein kendur bólkur, sum var virkin, tá ið palestinskir arabarar vóru riknir frá heimi, úr 49 bygdum í árunum millum 1947-49.

### 1947-49: 700.000 flóttafólk

Ísraelskar søgubókur, eisini skúlabøkur, hava í flestu førum lagt tað fram, at tey 700.000